# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað er burturvið og tápuligt av bretum at krevja Andrej Lugovoj útflýggjaðan fyri morð (Vladimir Putin).*

# Danskt farmaskip rænt



*»Danica White« er bygt í Danmark í 1985 og er skrásett í Nakskov.*

**Um vikuskiftið rændu sjórænarar danska farmaskipið »Danica White« úti fyri somalisku strondini.**

Fimm mans eru við skipinum, og uttanríkisráðið í Keypmannahavn metir sjóránið sum eitt sera álvarssamt mál.

-Tað er altíð álvarssamt, tá fimm danskir ríkisborgarar verða afturhildnir undir ógreiðum umstøðum, sigur Lars Thuesen í uttanríkisráðnum við danska útvarpið. Hann sigur, at uttanríkisráðið hevur mannað eina serliga deild, sum fyrst og fremst skal fáa greiði á, hvar tað rænda skipið er, og hvussu teir fimm menninir hava tað.

»Danica White« var á veg til Mombasa í Kenya og var statt 240 fjórðingar úr somalisku strondini, tá tað bleiv rænt fríggjadagin. Eitt franskt herskip var stutt frá teimum, sum tá sjórænararnir fóru inn um somalisku sjómarkið við danska skipinum, kundi tað franska herskipið ikki fylgja teimum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fremmand skip verða rænd úti fyri somalisku strondini. Í løtuni hava sjórænarar fýra skip umframt »Danica White«. Talan er um tvey skip úr Tanzania, eitt úr India og eitt úr Taiwan. Leygardagin varð ein av manningini á taiwanska skipinum skotin, og sjórænararnir hótta við at skjóta hinar eisini, fáa teir ikki loysigjald fyri skipið og farmin.

Á middegi í dag hevði danska uttanríkisráðið ikki frætt, hvat teir, sum rændu »Danica White«, krevja.

# Madeleine helst á lívi

**Portugisiska løgreglan heldur, at burturflytararnir vilja hava pengar aftur fyri gentuna.**

Nú ein mánað eftir at Madeleine McCann hvarv úr einum gistingarhúsi í Algarve í Portugal, gloppar portugisiska løgreglan fyri fyrstu ferð dyrnar fyri tí møguleika, at gentan bleiv burturflutt við tí fyri eyga at krevja loysigjald fyri hana.

-Vit kanna framvegis møguleikan fyri, at tann ella teir, sum tóku gentuna, gjørdu tað fyri pengar, og at burturflytararnir bíða við at krevja loysigjald, til tað nógva orðaskiftið um málið hevur lagt seg, sigur Olegario Sousa, løgregluovasti, við bretska blaðið Daily Mail.

Portugisiski løgregluovastin sigur, at er tað rætt, at Madeleine McCann bleiv burturflutt við tí fyri eyga at krevja loysigjald fyri hana, so er hon helst framvegis í Portugal. Løgreglan hevur leitað bæði væl og leingi í Algarve og aðrastaðni í landinum, men Olegario Sousa sigur, at tað er ikki lætt at finna eitt burturflutt barn.

-Ein burturflytari kann lættliga fjala barnið nærhendis staðnum, har hann rændi tað. Men hvør hevði komið undan kavi við einum kravi um loysigjald, meðan myndir av barninum standa á hvørjum gøtuhorni, spyr hann í samrøðuni við Daily Mail.



*5 ára gamla Madeleine McCann hvarv fyri einum mánað síðani*

## STUTT SAGT

### Burturvið

Tað er einki, sum bendir á, at russisku myndugleikarnir fara at eftirlíka bretska kravinum um at fáa fyrrverandi KGB-mannin Andrej Lugovoj útflýggjaðan. Sambært bretska ákæruvaldinum hevur samband við tilburðin, tá ein annar fyrrverandi KGB-maður, Alexander Litvinenko, varð myrdur í London í november. Russiski forsetin, Vladimir Putin, gjørdi í gjár sínar fyrstu viðmerkingar til bretska kravið um útflýggjan. Á einum tíðindafundi segði Putin, at bretska kravið er burturvið og tápuligt. Tað sigur, at bretar fáa neyvan sín vilja hesaferð.

### Fleiri berjast

Bardagarnir í Libanon versna, og í gjár fór enn ein islamistiskur felagsskapur upp í bardagarnar. Felagsskapurin, ið nevnir seg Jund al Sham, søkti at libanskum stjórnarhermonnum tætt við flóttafólkaleguna Ain al Hilweh, sum er 40 kilometrar sunnan fyri Beirut, og sum er tann størsta flóttafólkalegan í Libanon. Alment er einki samband ímillum Jund al Sham og felagsskapin Fatah al Islam, sum hevur verið í bardøgum við stjórnarherin síðani tann 20. mai.

### Heldur aðra brúgv

Í fleiri ár hava danskir og týskir politikarar tosað um at gera eina brúgv millum Danmark og týsku oynna Femern, men nú skjóta tveir av teimum donsku flokkunum upp at gera brúnna ímillum Gedser og Rostock ístaðin fyri. Tey Radikalu og Danski Fó9lkaflokkurin siga við Jyllandspostin, at við at gera brúnna millum Gedser og Rostock verður teinurin millum Keypmannahavn og Berlin 130 kilometrar styttri enn við einari brúgv til Femern. Teinurin til Pólands styttist heilar 230 kilometrar, vísa teir báðir flokkarnir á.